✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi, verpápi og abbi okkara

ALBERT JOENSEN
Tórshavn

andaðist á landssjúkrahúsinum sunnudagin 20. nov. 56 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin 23. nov., kl. 13.

Rói, Jón og Johannus

Sjófólk og vanlukkutrygging

Heimatrygging av sjómonnum

Sóknarstýrislistar yvir persónar, ið hava vanlukkutryggingarskyldu liggja frammi til alment eftirlit hjá býar/bygdaráðum frá 1. til 15. desember.

Tryggingarskyldu hava bert tey, ið vinna í minsta lagi 1/5 av ársinntøkuni á sjónum.

Hava tygum persónliga tryggingarskyldu, kannið so eftir, um navn tygara er á listanum. Um tað vantar, biðið so um at fáa tað skrivað á.

Eru tygum harafturímóti **ikki** tryggingarskyldigur, biðið so um at fáa navn tygara strikað.

Persónar, ið ætla sær til skips fyrstu ferð í 1995, eiga somuleiðis at venda sær til býar/bygdaráðið um at fáa navnið skrivað á listan.

Listarnir eru hareftir avgerandi fyri, hvat viðvíkur rætti til endurgjald, um vanlukkutilburður berst á.

Heimafólk kunnu tekna persónliga vanlukkutrygging við at venda sær til Føroya Vanlukkutrygging. Samstundis verður mint á, at øll, ið hava fólk í arbeiði, hava skyldu at boða Vanlukkutryggingini frá hesum.

FØROYA VANLUKKUTRYGGING
Yviri við Strond 23
Postboks 59 - 110 Tórshavn
Telefon 11466 - Telefax 15952

Til Islandsvinir i Færeyjum

Við hittumst øll Føstudaginn 25/11 hjá Njáli, að Garðsgøtu 1, Argjum, stundislega kl. 7. Við fáum eitthvað í goggin, og ræðum málin.

Kostnaður kr. 50,-.

Sími 19194

Bjartskygni vestan fyri Hetland »hevur ikki hald í veruleikanum«

Tað bjartskygni, ið hevur valdað viðvíkjandi oljunámum vestan fyri Hetland, er misleiðandi, sambært einum vælkendum felagi av óheftum orkuráðgevum.



Birgir Christiansen

ABERDEEN

Aberdeen, 21. nov. 1994

Í novemberútgávuni av felagsblaði sínum, vilja Mackay Consultants vera við, at ferðin á menningini og framleiðsluni av olju fer at verða nógv minni enn flestu vænta.

Ein av orsøkunum fyri stóra áhuganum nýliga fyri leiðunum vestan fyri Hetland, vóru vánalig úrslit av leitingum í bretska partinum av Norðsjónum. Í 1977, tá Clair-økið varð funnið, vórðu leiðirnar vestan fyri Hetland skírdar tað mest lovandi oljuútjaðaraøkið undir bretska landgrunninum.

Vánaligt grundarlag

Eitt dømi um økta áhugan var ein ráðstevna hildin í Aberdeen herfyri av Smith Rea Energy Analysts. Smith Rea gav út eina frágreiðing, ið metti, at leiðirnar vestan fyri Hetland fóru at gerast eitt nýtt Norðsjóvarævintýr. Harafturat skuldu hesar leiðir gerast tær mest virknu næstu tíggju árini, og í 2005 skuldi triðingurin av bretsku oljuframleiðsluni koma hagani.

»Metingarnar vaktu stóran ans í ídnaðinum, men í veruleikanum er frágreiðingin ein vánalig búskaparlig greining, ið kemur til øgvuliga bjartskygnar og misleiðandi niðurstøður. Lítið og einki prógv er fyri niðurstøðunum«, stóð at lesa í blaðnum frá Mackay Consultants.

Fram til 1989 vóru nærum 70 brunnar boraðir á leiðunum, harav bert Clair-økið og fimm smá gass-øki vóru verd at nevna. Eins og nú var fyrst í áttatiárunum líknandi bjartskygni viðvíkjandi Clair-økinum, men hetta bleiv skjótt til vónbrot, tá oljan hagani vísti seg at vera sera tjúkk og ring at fáast við.

Eftir 1989 eru 4 týðandi oljuøki funnin: Foinaven, Schiehallion, Conival og Solan. Loyvi var í farnu viku givið av bretska ídnaðarmálaráðharranum at fara í gongd við at menna Foinaven-økið, so farast kann undir framleiðslu seint í komandi ári.

Mackay Consultants siga eins og nógvar aðrar frágreiðingar, at Foinaven hevur eina goymslu uppá millum 250 og 500 milliónir tunnur av olju. Fyri hini trý økini verða 250 milliónir tunnur mettar sum ein rímulig nøgd.

»Hesi fýra økini kunnu sostatt framleiða uml. 1 milliard tunnur av olju, samanborið við 2,5 úr Forties, 2 úr Brent og 1,2 úr Ninian. Við øðrum orðum, so benda verandi prógv á, at økini vestan fyri Hetland samanlagt fara at framleiða minni enn eitt av teimum stóru økjunum í Norðsjónum«.

Mackay Consultants søgdu, at onnur nám vóru sannlík, og nøkur teirra kunnu gerast risanám. »Tá hetta er sagt, so eru verandi prógv ikki grundarlag fyri at tosa um eitt oljuævintýr, ið kann standa mát við Norðsjógvin«.


Menning ikki løtt

Blaðið ávaraði um, at menningin av økjunum vestan fyri Hetland fer ikki at verða løtt, orsakað av vána umstøðum og lágum oljuprísum. Ein rørleiðingarskipan er ein fyritreyt at menna økini, men tey øki, ið higartil eru funnin, eru ov smá til at ein tílík íløga kann gerast. Clair-økið er lykilin til eina slíka rørleiðing, men enn er framtíðin hjá tí økinum óviss.

»Námini vestan fyri Hetland eru góð tíðindi fyri frálandavinnuna, sjálvsagt, men neyvan gerast leiðirnar sama oljuævintýr sum Norðsjógvurin«, segði blaðið frá Mackay Consultants at enda.



Umboð fyri Smith Rea ráðgevarafyritøkuni her á oljuráðstevnuni í Aberdeen herfyri. Nú verða teirra frágreiðingar mettar alt ov bjartskygdar av kapppingarneytanum MACKAY. Mynd jan



MACKAY
CONSULTANTS

NEWS RELEASE

Embargo: Please do not use before 12 noon Monday 21 November 1994

OVEROPTIMISM ABOUT WEST OF SHETLAND OIL DISCOVERIES

The latest edition of Mackay Consultant's "North Sea Oil and Gas Commentary" (copy attached), which is published today, casts serious doubt on the recent predictions that the West of Shetland oil finds could become a second North Sea. The consultants say that although the discoveries are very welcome, they are all relatively small and output from them will only be about the equivalent of 10% of UK North Sea oil production. The rate of development will also be much slower than predicted.

The Commentary includes four other articles on

- the Frigg pipeline dispute
- the Faroese offshore industry
- the Barents Sea
- offshore Ireland.

Mackay Consultants criticise the UK Government's attitude in the Frigg pipeline dispute which has soured the previously good relationship between the UK and Norway. They claim that the real objective of the UK Government is to reduce gas imports from Norway which are threatening the viability of some small gas discoveries in the Southern North Sea.

The Faroese article outlines the current state of the negotiations over the boundary line between the Faroe Islands and the UK. The Faroese Government is hoping that exploration drilling will begin in 1996.

The Barents Sea article concludes that this frontier area has proved to be very disappointing and oil industry interest has declined substantially.

In contrast, there is renewed interest offshore Ireland, where Mackay Consultants expect exploration activity to increase significantly over the next few years.

...

For further information, please contact:

Tony Mackay or David Rennie

Telephone: 0463 223200
Fax: 0463 230869

1 View Place
Inverness IV2 4SA
Scotland, U.K.
Tel: (0463) 223200
Fax: (0463) 230869

Economics & Management Consultants

Also at
Brea Centre
Surrey University Innovation
Stirling FK9 4NF
Scotland, U.K.
Telephone: (0786) 479444
Fax: (0786) 479555

Rætting

Í týsdagsblaðnum varð skrivað at Kunningarstovan í Klaksvík hevði skipað fyri summarkaffé í Kunoy, men er tað ikki satt.

Kunoyingar hava sjálvir skipað fyri summarkaffeini, sum var í Kunoy, og vit biðja kunoyingar orsaka.

Annars skulu vit siga, at skriv kom frá Ferðaráði Føroya, sum skrivaði, at Kunningarstovan hevði skipað, fyri hesum tiltaki.

TÓNLEIKA BOND

Gott og fjølbroytt úrval.

Tlf. 71793